Samferðslumálaráðið
Tinganes
Postboks 64
FO-110 Tórshavn
astrid@smr.fo

Tórshavn, tann 31. august 2018
Mál nr.: **S8000-016/18**

Ref.: brs/akr

**Viðvíkjandi uppskoti til broyting í løgtingslóg um trygging móti avleiðingum av arbeiðsskaða (arbeiðsskaðatryggingarlógin)**

P/F Trygd hevur fingið omanfyri nevnda uppskot (um at leggja Føroya Vanlukkutryggingarráð og Arbeiðs- og brunaeftirlitið saman) til hoyringar.

Vit skulu við hesum boða frá, at vit ongar viðmerkingar hava til sjálva samanleggingina og grundgevingarnar fyri henni. Vit hava tó onkrar spurningar til tað, sum stendur í viðmerkingunum til uppskotið umframt ein spurning til gjald av nýggju skipanini.

## 1.4 Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Her verður sagt, at ætlanin er at skipa uppgávurnar í eini serstakari arbeiðsskaðadeild inni á stovninum, og at deildin skal mannast við einum ella tveimum skrivstovufólkum og einum løgfrøðingi/fulltrúa, umframt at tað hevur stóran týdning, at Arbeiðs- og brunaeftirlitið "*hevur atgongd til arbeiðsmedisinska servitan og metingar."* Okkara spurningur er, hvat liggur í hesi orðing? Er ætlanin av broyta verandi mannagongd í sambandi við viðgerð av skaðamálum, har ein lækni altíð er til staðar, tá avgerðirnar verða tiknar? Skulu avgerðir í skaðamálum framyvir í ávísan mun takast *uttan medisinska servitan*? Um so er, eru vit ivasom yvir fyri valda leistinum.

## Gjald fyri arbeiðsskaðadeildina

Hvørjar útreiðslur koma tryggingarfeløgini at gjalda fyri framyvir í mun til verandi skipan við Vanlukkutryggingarráðnum? Vit vóna og vænta, at ein samanlegging av slíkum slag førir til eina meira effektiva umsiting og harvið eitt lægri gjald fyri tryggingarfeløgini enn núverandi gjald.

Vinarliga
TRYGD

| | |
|---|---|
| **Brian Smedemark** | **Anja K. Øster** |
| Stjóri | Compliance |